UTTAN ÚR HEIMI

# Vórðu illaviðfarnir í Guantanamo-leguni

**Tríggir av teimum fimm bretunum, sum eru slopnir leysir úr amerikonsku fangaleguni í Guantanamo Bay í Kuba, siga, at teir vórðu illa viðfarnir, bæði sálarliga og likamliga**

FANGAR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Ruthal Ahmed, Asif Iqbal og Shafiq Rasul siga við bretska blaðið The Observer, at teir vórðu avhoydir meiri enn 200 ferðir ta tíðina, teir vóru fangar í Guantamamo-leguni. Avhoyrararnir komu frá amerikonsku fregnartænastuni CIA, samveldisløgregluni FBI, fregnartænastuni hjá amerikanska herinum og teimum báðum bretsku fregnartænastunum MI5 og MI6.

Teir tríggir menninir greiða frá, at vápnaðir hermenn tveittu teir á gólvið í avhoyringarhølinum, og at teir javnan høvdu skotvápn ímóti høvdinum, meðan teir vórðu avhoyrdir. Ofta vórðu teir avhoyrdir í fleiri tímar hvørja ferð, og ferð eftir ferð royndu avhoyrararnir at noyða teir at játta, at teir høvdu samband við onkran yvirgangsfelagsskap.

Teir tríggir menninir siga, at teir vóru í Pakistan, tá USA leyp á Afghanistan, og at teir fóru um markið at arbeiða sum neyðhjálparmenn. Men har endaðu teir sum fangar hjá Norðursamgonguni, sum lat amerikanararnar fáa teir.

Bretska stjórnin hevur fleiri ferðir sagt seg ivast í viðurskiftunum hjá fangunum í Guantanamo-leguni, og stjórnin hevur eisini sagt, at hon hevur gjørt alt fyri at fáa teir bretsku ríkisborgararnar haðani. Men í samrøðuni við The Observer siga teir tríggir menninir, at tær báðar bretsku fregnartænasturnar avhoyrdu teir fleiri ferðir, og at umboð fyri bretsku sendistovuna í Washington eisini vóru í fangaleguni.

- Eg spurtdi teir, um teir kundu siga mær, hvar eg var, men tað vildu teir ikki. Tá eg spurdi, hvussu leingi eg skuldi sita fangi, svaraðu teir, at eg slapp ongantíð burtur haðani, sigur Rasul við The Observer.

Bretska uttanríkisráðið váttaði fyri BBC sunnukvøldið, at tað er farið at kanna tað, sum menninir siga.



*Sambært bretunum, sum eru slopnir úr fangaleguni í Guantanamo, verða fangarnir har illa viðfarnir. Bretska uttanríkisráðið kannar nú viðurskiftini*

*Mynd: Reuters*



*Formaðurin hjá sponsku sosialistunum, José Luís Rodriguez Zapatero, fegnast um valsigurin sunnukvøldið*

*Mynd: Reuters*

# Spania broytir kós

**Sponsku sosialistarnir, sum vunnu valið sunnudagin, fara at leggja Spania á eina aðra uttanríkispolitiska kós**

VAL Í SPANIA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Valsigurin hjá sosialistiska flokkinum PSOE var uttan iva eitt óbeinleiðis úrslit av teirri blóðugu bumbuatsókníni at Madrid í síðstu viku.

Nógvir spanskir veljarar vóru sera misnøgdir við, hvussu stjórnin hjá Jose Maria Aznar, forsætisráðharra, hevði handfarið kanningararbeiðið aftan á atsóknina. Longu beint eftir brestirnar helt stjórnin uppá, at tað var baskiski yvirgangsfelagsskapurin ETA, sum hevði lagt bumburnar, men aftan á fráboðanina frá al-Qaeda noyddist stjórnin at viðganga, at hon hevði mistikið seg.

Tað revsaðu veljararnir hana fyri. Stjórnarflokkurin, sum sambært øllum veljarakanningum stóð til at vinna valið, fekk 37,6 prosent av atkvøðunum, meðan tann sosialistiski andstøðuflokkurin PSOE fekk 42,6 prosent.

Sosialistiski floksformaðurin, tann 43 ára gamli José Luís Rodroguez Zapatero, segði aftan á valsigurin, at flokkurin fer at leggja spanskan politikk á eina aðra kós. Hann lovaði, at landið fer at halda fram við bardaganum ímóti yvirgangi, men eygleiðarar í Madrid siga, at spanski uttanríkispolitikkurin verður ein annar nú. Undir valstríðnum lovaðu sosialistarnir, at teir fara at taka teir sponsku hermenninar úr Irak, og eygleiðararnir siga, at sosialistarnir fara at knýta Spania tættari ES, meðan sambandið við USA verður veikari í framtíðini.

# Putin fekk 69 prosent

VAL Í RUSSLANDI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Vladimir Putin vann sum væntað russiska forsetavalið, men USA fýlist á valstríðið.

Russiski forsetin eitur framvegis Vladimir Putin. Á valinum sunnudagin fekk hann 69 prosent av atkvøðunum, og tað var á leið tað, sum veljarakanningarnar søgdu undan valinum.

Tá úrslitið var greitt, segði Putin, at hann fer at virtka fyri framhaldandi búskaparframgongd í Russlandi, og eygleiðarar í Moskva er á einum máli um, at tað var júst tann búskaparligi framburðurin, sum fekk russar at velja Putin til forseta eitt valskeið afturat.

Amerikanska stjórnin er ikki serliga hugtikin av russiska forsetavalinum. Colin Powell, uttanríkisráðharri, segði sunnukvøldið við sjónvarpið Fox News, at russiska demokratiið kann ikki fáa altjóða viðurkenning, fyrr enn øll valevni hava somu atgongd til fjølmiðlarnar. Tað sama segði trygdarpolitiski ráðgevin, Condollezza Rice, við CNN.

Men kanska er ein broyting á veg í Russlandi í so máta. Sunnukvøldið segði Putin á einum tíðindafundi, at hann fer at virka fyri, at Russland fær fjølmiðlafrælsi.



# Fólkið nærri náttúruni

**- Vit mugu geva skapanarverkinum størri ans, heldur Finnbogi Joensen, formaður í nýstovnaða Lokal Agenda 21 felagnum í Vestmanna**

UMHVØRVI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Landsstýrismaðurin í almannamálum, Hans Pauli Strøm, nýtti høvið at heilsa uppá formannin í Lokal Agenda 21 felagnum í Vestmanna, Finnboga Joensen. Eisini tinglimir úr bygdini vóru á stovnandi aðalfundinum*

Fyrsta Lokal Agenda 21 felagið í Føroyum varð stovnað í Vestmanna sunnudagin. Felagið hevur til endamáls at kunna bygdarfólkið um ymiskt, sum hevur við umhvørvið at gera, til dømis at ráðgeva um urtagarðsrøkt, at geva bygdarfólkinum tilboð um bíligar plantur og runnar, at skipa fyri hugnaløtum við sangi og upplestri, har kjak verður um at fríðka bygdina, umframt at stuðla grønari orku við gransking á økinum.

Finnbogi Joensen, ið var ein av stiðtakarunum til Lokal Agenda 21 í Vestmanna, og sum nú er formaður, sigur at felagið hevur fleiri mál á skránni. Hann nevnir sum dømi, at felagið í næstum fer at skipa fyri tiltaki, har fólk kunnu keypa plantur, og samtíðis fáa urtagarðsráðgeving. Eisini fer felagið at skipa fyri gongutúrum saman við Kunningarstovuni.

– Tað snýr seg at fáa fólkið nærri náttúruni, sigur Finnbogi Joensen.

## Burturkast frá skipum

Ein av uppgávunum hjá felagnum verður at skipa so fyri, at minni verður tveitt í havið frá føroysku skipunum.

Ítøkiliga ætlar felagið at arbeiða fyri, at skip í Vestmanna sleppa av við gamlan trolreiðskap, og ætlanin er at gagnnýta gomlu trolini. Í næstum fer Lokal Agenda 21 í Vestmanna at prenta faldarar við upplýsingum til skipini um vandan við at brúka havið sum ruskpláss. Faldararnir verða ikki bert latnir skipunum í Vestmanna, men úr øllum landinum.

## Globalt og lokalt

Slagorðið, at hugsa globalt og handla lokalt, er reyði tráðurin í arbeiðnum hjá nýggja Lokal Agenda 21 felagnum í Vestmanna.

– Vit mugu duga betur at umsita skapanarverkið, so okkara eftirkomarum verður lív lagað, leggur Finnbogi Joensen dent á.

Hann vísir á Rio-sáttmálan frá 1992, tá heimsins tjóðir undirskrivaðu ein greiðan málsetning um at ansa betur eftir náttúruni.

## Samstarv

Lokal Agenda 21 felagið í Vestmanna ætlar sær at samarbeiða við kommununa um størri verkætlanir, umhvørvinum í bygdini til frama.

Kreftirnar hava higartil verið lagdar í at fáa savnað fólk til sjálvbodna nevndararbeiðið í felagnum, og tískil hava umboð fyri felagið enn ikki tosað við Vestmanna Kommunu.

– Í samband við størri verkætlanir er tað sjálvandi ein spurningur um pengar, men felagið vil so koma við uppskotum og veita ráðgeving, sigur Finnbogi Joensen og vísir á, at kommunan sjálvsagt ikki er bundin at nøkrum.

## Grøna bygdin

Í fleiri ár hevur Vestmanna verið undangongubygd á umhvørvisøkinum. Eitt dømi er viðarlundin í bygdini, har hvørt barn eigur sítt træ. Skúlin og barnagarðurin eru sonevndir »grønir« stovnar, og í hesum døgum verða serligar sólcellur lagdar á takið á ítróttarhøllini, ið skulu geva tveir triðingar av streymorkuni til skúlan.

– Hetta er í síðsta enda ein spurningur um hugburð, og um at gera nakað fyri trivnaðin í bygdini, sigur Finnbogi Joensen, og vísir á, at Føroyar eru eftirbátur á umhvørvisøkinum.

## Felagið í gongd

Umleið 40 fólk vóru á stovnandi aðalfundi hjá Lokal Agenda 21 felagnum í Vestmanna sunnudagin.

Í nevndina vóru vald Finnbogi Joensen, formaður, ið arbeiðir sum umsjónarmaður í Vestmanna skúla. Hini í nevndini eru Petur Andreasen, arkitektur og byggifrøðingur, Gurið Undir Kletti, bachelor í ráðlegging og náttúru, Sóley Poulsen, bankakvinna og Jógvan í Dávidsstovu, skipari, sum eisini hevur tilknýti til ferðavinnuna. Tiltakslimir eru John Zachariassen, Marner Joensen og Kirsten Jensen.

Finnbogi Joensen sigur, at málið er at fáa alt bygdarfólkið í Vestmanna við í felagið. Men hann leggur samtíðis dent á, at fólk aðrastaðni frá, umframt stovnar og fyritøkur, eru vælkomin at vera við í felagnum.

Limagjaldið er 100 krónur fyri einstaklingar, 150 krónur fyri húski og 500 krónur fyri feløg.

# Føroya Tele breyt konsessiónina

**Tá Føroya Tele strikaði mánaðargjaldið á uppringdum internetsambandi var mista inntøkan tikin av øðrum rakstrarpostum í fyritøkuni, og tí breyt fyritøkan konsessiónina, staðfestir Kærunevndin hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Kortini sleppur Føroya Tele undan áralangum dagbøtum**

SAMSKIFTI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Tapið av strikaða mánaðargjaldinum á uppringda internetsambandinum frá Føroya Tele varð fíggjað av øðrum inntøkuøkjum, og tað er ikki loyvt, staðfestir Kærunevndin hjá Fjarskiftiseftirlitinum.*

Tað var ikki í lagi, at Føroya Tele strikaði mánaðargjaldið á uppringdum internetgjaldi upp á 70 krónur. Mista inntøkan av gjaldinum, ið var tilsamans fimm milliónir krónur, varð fíggjað av øðrum inntøkupostum í fyritøkuni, og sostætt var talan um sonevndan krossstuðul. Og hetta er brot á konsessiónina hjá Føroya Tele, staðfestir Kærunevndin hjá Fjarskiftiseftirlitinum.

## Ongar dagbøtur

Í september 2002 boðaði Fjarskiftiseftirlitið Føroya Tele frá, at eftirlitið ikki kundi góðtaka strikaða mánaðargjaldið. Tí hetta fór at geva fimm milliónur krónur í halli, ið skuldi fíggjast við øðrum inntøkum. Ístaðin álegði Fjarskiftiseftirlitið Føroya Tele at krevja mánaðargjald. Føroya Tele hevði um hetta mundið 85 prosent av marknaðinum fyri uppringt internetsamband, og tí var neyvan sannlíkt, at fyritøkan fór at vinna sær størri marknaðarpart og harvið kompenserandi inntøkur við átakinum, metti Fjarskiftiseftirlitið.

Men Føroya Tele vildi ikki fylgja avgerðini hjá Fjarskiftiseftirlitinum og kærdi málið til Kærunevndina hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, vísir á, at fyritøkan lá í harðari kapping við Kall, ið longu bjóðaði ókeypis, uppringt internetsamband. So fyri at varðveita viðskiftafólkini var neyðugt hjá Føroya Tele at strika mánaðargjaldið.

Fjarskiftiseftirlitið hótti Føroya Tele við dagbøtum, til viðurskiftini vóru fingin í rættlag. Men nú Kærunevndin hevur staðfest avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum, skal Føroya Tele kortini ikki gjalda dagbøtur fyri tíðarskeiðið frá september 2002 til dags dato.

Niðurstøðan hjá Kærunevndini er, at Fjarskiftiseftirlitið ikki nóg greitt álegði Føroya Tele dagbøturnar. Tí væl hótti Fjarskiftiseftirlitið í síni avgerð Føroya Tele við dagbøtum, men tá telefyritøkan valdi ikki at fylgja avgerðini, fylgdi eftirlitið ikki málinum upp við at áleggja Føroya Tele dagbøturnar.

Hesin feilur hjá Fjarskiftiseftirlitinum hevur sostætt spart Føroya Tele fleiri milliónir krónur, tí dagbøturnar vera vanliga givnar við støði í einstaka málinum.

## Góðtekur ikki avgerðina

Enn er ikki greitt, hvør avleiðingin av avgerðini hjá Kærunevndini verður. Jógvan Thomsen, stjóri á Fjarskiftiseftirlitinum, sigur at málið fyrst skal viðgerast í Fjarskiftiseftirlitinum.

Hann dugir tí enn ikki at siga, um Føroya Tele til dømis verður álagt aftur at krevja mánaðargjald fyri uppringda internetsambandið.

Eisini kann hugsast, at Fjarskiftiseftirlitið fer at krevja Føroya Tele eftir dagbøtum, til viðurskiftini eru fingin í rættlag, og málið kann í síðsta enda meldast til fútan, sigur Jógvan Thomsen. At tí at talan er um brot á konsessiónina kann somuleiðis koma upp á tal, at Fjarskiftiseftirlitið sendir eina fráboðan til landsstýrismannin í samskiftismálum.

Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, er ikki nøgdur við avgerðina hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Hann vísir á, at Føroya Tele avgjørt metir seg hava rætt til at selja ein vøru við undirskoti eina tíð fyri at fáa viðskiftafólk. Hann vísir á, at undirskotið hevði verið størri, um mánaðargjaldið ikki var strikað, tí tá hevði Føroya Tele mist øll viðskiftafólkini til kappingarneytarnar.